## Pedagogar skipað seg



Nevndin í Føroya Pedagogfelag skipaði seg í gjár. Nevndin varð vald á aðalfundi fyri einari viku síðani, og hon hevur skipað seg við Jarvini F. Hansen sum formanni og Maud Wang Hansen sum næstformanni. Hini í nevndini eru Jógvan Philbrow, Sigga Óladóttir Joensen og Anja Egholm. Nevndin sigur, at hon fer nú at fyrireika komandi sáttmálasamráðingarnar og 25 ára dagin á pedagogfelagnum, sum verður í summar.

## Davið kanska vitni

Virksemið hjá stóru íslendsku fyritøkuni Baugur verður endavent í rættinum í Reykjavík í hesum døgum, tí ákæruvaldið hevur illgruna um svik. Fleiri vitni eru avhoyrd, og fleiri afturat skulu avhoyrast, og í gjárkvøldið kom fram, at fyrrverandi forsætisráðharrin Dávið Oddsson kanska verður boðsendur at vitna. Hann hitti ein av oddamonnunum í Baugi í London í 2002, og kanska skal hann greiða frá, hvat hendi á fundinum.



*Myndin er tikin á Kósabrúnni í morgun, har nógv virksemi var, nú skip eru inni og landa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fiskivinnubýurin ikki so sárbarur

**Virksemið við bryggjukantin í Klaksvík er ikki longur so neyvt tengt at streymi og veðri, tí nú eigur Klaksvíkin fleiri ísfiskatrolarar, sum fara og koma í at kalla øllum líkindum**

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Tað er so aktuelt at tosa um, at føroyska samfelagið eigur at hava fleiri bein at standa – og ikki bara tað eina beinið, sum er fiskivinnan.

Øll hugskot um nýggjar alternativar vinnur eru kærkomin, og øll fegnast, tá tað vísir seg, at okkurt, sum ikki er tengt at fiski, fæst at bera til.

Onkur í fiskivinnuni skal hava so beinrakið sagt, at »vit mugu hava file'ina, til vit hava fingið idé-ina…«

Tá borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, setti sjómannadagin í fjør heyst, segði hann eina fitta søgu.

Tað var ein fín kona í Klaksvík, sum í góðveðrinum ein dagin kom gangandi fram við einum kjallara, har maður stóð og egndi. Roykurin av gomlum agni reyk um húsanna, og henda fína kvinnan hevði hug at snerkja. Tá ið skuldi maðurin, sum stóð við stampinum, hava á munni við konuna: »Onkur má lukta illa fyri, at tú skal kunna lukta væl..«

Klaksvíkin er ein rættiligur fiskivinnubýur, og tað er stuttligt at koma oman á Kósabrúnna ein slíkan dag, sum í dag, tá skip landa, og nógv virksemi er við bryggjukantin og inni á virkinum.

Býurin hevur ígjøgnum mong ár verið neyvt tengdur at húkavinnuni, og tá ið so er, kemur tann nógvi fiskurin upp á land í tørnum. Tá er tað serliga streymur, veður og vindur, sum gera av, nær skipini fara – og nær tey koma. Men síðan virkini fóru at keypa skip innundir seg aftur, og Kósin í Klaksvík ikki er aftarliga í tí »kórinum«, eru fleiri ísfiskatrolarar komnir til Klaksvíkar.

Hetta merkir, at virksemið á fiskavirkjunum í oynni ikki longur er so neyvt tengt at streymi og veðri.

Ísfiskatrolararnir royna at kalla í øllum veðri, og tí eru landingarnar í Klaksvík nú meira regluligar enn áður.

Umframt stóra virksemi ein slíkan dag á Kósabrúnni, er nógv egning í skúrunum á Stongunum, tá ið líkindi eru til útróður.

# Hópur av skipum landa í Klaksvík

**Í morgun fóru menn hjá Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík til Fuglafjarðar at landa ísfiskatrolaran Smaragd, tí maskinan fekst ikki í gongd aftur, tá ið farast skuldi á Klaksvík við veiðini**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nógvur fiskur kemur upp á land og tað, sum ikki fer beint inn á virkið til virkingar, verður koyrt upp í bilar og fer aðrastaðni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Fleiri skip hava landað í Klaksvík hesa vikuna, og næstu dagarnar koma eisini fleiri skip inn at landa.

Landingarmiðstøðin í Klaksvík landar tvey skip í dag. Ísfiskatrolarin Safir hevur 85.000 pund og »makkarin« hjá honum, Smaragd, hevur út við 90.000 pund.

Safir landar á Kósini, meðan veiðan hjá Smaragd verður løgd upp í Fuglafirði í morgun og verður síðan koyrd til virkingar í Klaksvík.

### Maskinbrek

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at Smaragd fór til Fuglafjarðar eftir loknan túr at gera okkurt við trolið, men tá ið teir skuldu loysa og fara á Klaksvík við veiðini, fingu teir ikki skipið í gongd aftur, tí okkurt var áfatt við startaranum.

- Vit landa tí skipið í Fuglafirði, og síðan verður veiðan koyrd til Klaksvíkar, sigur hann.

Gomlu Polarhav og Stjørnan, núverandi Navarin og Borgarin, landaðu í Klaksvík í gjár. Teir høvdu 215.000 pund tilsamans.

Ísfiskatrolararnir, Fjalshamar og Nónhamar, løgdu eisini veiðina upp í Klaksvík í gjár. Teir høvdu 150.000 pund tilsamans.

Veiðan hjá øllum ísfiskatrolarunum er upsi, og sagt verður, at upsin er betri til støddar í ár enn í fjør og fyrraári.

### Línuskipini

Pól Fuglø veit at siga, at línuskipið Pison er á veg til Klaksvíkar. Teir verða inni í dag. Í morgin koma línuskipini, Núpur og Ågot.

- Eg spurdi ikki, hvat Pison hevur inni, tá eg tosaði við teir, men sum eg skilji, hava Ågot og Núpur eini 70.000-80.000 pund hvør.

Landingarformaðurin sigur seg vænta, at trý línuskip koma inn at landa komandi mánadag, Klakkur, Kvikk og Polarstjørnan.

Fiskiskapurin hjá línubátunum undir Føroyum hevur verið misjavnur í seinastuni. Summir dagar roynast hampiliga væl, men aðrar dagar er fiskiskapurin slakari

- Fiskaprísurin er framvegis góður og støðugur, sigur Pól Fuglø, sum var staddur í Fuglafirði, tá ið vit høvdu hann í telefonini í morgun.




*Fjalshamar var millum skipini, sum landaðu í Klaksvík í gjár. Aftur í dag er landing á Kósini, og soleiðis verður eisini næstu dagarnar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*